## ÍF hevði fund um framtíðina

Fríggjakvøldið skipaði ÍF fyri pallborðsfundi í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Yvirskriftin fyri fundinum var "Hvat vilja vit við ÍF fótbólti?". Fimm mans vóru í pallborðinum, sum hevði stuttar framløgur og svaraði spurningum frá teimum sløku 50 fólkunum á fundinum. Í pallborðinum vóru John Petersen, Jón Simonsen, Sølvi Reinert Hansen, Eyðun Klakstein og Rógvi Róin. Á fundinum varð tosað um fótbóltsvenjing, kringumstøður og møguligt samstarv ella samanlegging við onnur feløg. Fundarfólkið var positivt sinnað mótvegis øktum samstarvi við grannafeløgini.

## Hargreaves til Manchester United

Um vikuskiftið skrivaðiu fleiri týsk bløð, at miðvallarovastin hjá Bayern München, Owen Hargreaves, var seldur til Manchester United. Í gjár váttaði ovastin í Bayern München, Franz Beckenbauer, fyri sjónvarpsrásini DSF, at Hargreaves er seldur. Hvat felag hann er seldur til, sigur hann einki um, men eftir øllum at døma er tað til Manchester United. Týsk bløð siga seg vita, at Manchester United hevur goldið 185 mió. kr. fyri enska landsliðsleikaran, sum nú fær eina munandi hægri løn frá ensku meistarunum.



Skála-NSÍ 0-1 (0-1):

# Aftur gerandisdagur á Skála

**Hóast teir leingi vóru illa kroystir, so eydnaðist teimum í NSÍ í intensivari grannauppgerð at halda tørn um leiðsluna, sum Hjalgrím Elttør tíðliga syrgdi fyri**

*NSÍ*

*Skála*

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

So er tað aftur gerandisdagur á Skála. Leikliga avrikið var framvegis undirstriking av, at John Petersen hevur tikið um stýrisvølin. Men úrtøkan var ikki, sum hon hevur verið seinastu seks ferðirnar, tá ið Skála altíð hevur havt okkurt við sær av vøllinum.

Bygdarstevna og steyp vóru á skránni. Hjá Skála og NSÍ snúði tað seg fyrst og fremst og bara um stigini. Í tí kappingini endaði NSÍ omaná. Avgerandi fyri, at øll stigini fóru til Runavíkar, var málið, sum Hjalgrím Elttør var meistari fyri, tá ið rúmliga tíggju minuttir vóru farnir.

Hjalgrím, sum í løtum var rættuliga eyðsýndur, fekk bóltin eitt sindur aftanfyri miðstrikuna og mitt á. Hann setti ferð á, sneiddi framvið fleiri, nýtti Boga Løkin sum millumstøð í eitt tvey samanspæli, og var tryggur, tá ið hann gjørdist leysur mitt fyri og dygst røttu megin rangstøðumarkið.



*Við sigrinum á Skála helt NSÍ fast í oddinum, har teir saman við EB/Streymi og B36 tykjast hava hug at renna undan restini*

*Mynd: Einslistir*

### Góða løtan

Fyrra umfarið var fótbóltsspælið rudduligari og meiri samanhangandi, enn tað var tað eftir steðgin. Báðir partar royndu at samanspæla. Flytingarnar vóru nógvar, og báðir partar flutt fleiri spælarar fram á vøllin, tá ið teir fóru í álop.

Levi Hanssen var sera eyðsýndur á Skála miðvøllinum, og Obi arbeiddi nógv í Skála álopinum. Obi var fleiri ferðir nær við og næstan, men hann tykist ikki hava marginalarnar í sínum parti.

Á NSÍ miðvøllinum var fyrrverandi Skála spælarin, Nenad Stankovic, meiri eyðsýndur, enn hann hevur verið tað fyrr í ár. Hjalgrím Elttør hevði í løtum týdningarmikil rykk, og tað var eftir eitt sovorðið, at einsamalla málið kom, sum bar við sær, at øll stigini endaðu í Runavík.

### Órudduliga løtan

Sum 1. hálvleikur leið og mest sum alt seinna umfarið var tað Skála, sum legði NSÍ undir trýst. Kanska eisini tí at NSÍ gav stóran part av vøllinum til heimaliðið at spæla á.

Tað nógva gekk fyri seg á NSÍ hálvuni, og fleiri ferðir var nær við og næstan í brotsteiginum frammanfyri Jens Martin Knudsen, har NSÍ liðformaðurin, Óli Hansen, aftur hesa ferð var ófør ur stýrimaður.

2. hálvleikur var eyðkendur av nógvum ov lítíð neyvum sendingum, og harvið gjørdist talan – lokaluppgerð so líkt - um nógvar nærdystir, sum spælararnir løgdu seg í av fullu huga og orku. Talan var kortini ongantíð um ringan hýr. Ikki minst tí Lars Müller kom stak væl frá uppgávuni sum 23. maður á vøllinum.

Besta møguleikan at gera mál fekk Obi eftir langa framlegging, men tá ið hann eitt sindur úr vinstru var komin inn um verjuna og royndi seg, var skotið ullint og forkølað, og Jens Martin hevði ikki stórvegis trupulleikar.

Hugflogið og neyvleikin hjá Skála í royndunum at spæla seg ígjøgnum NSÍ verjuna vóru ikki nóg stór. Tað var ein av orsøkunum til, at møguleikarnir vóru so fáir. Kanska sótu teir 120 steypaminuttirnir í Klaksvík í kroppinum, men tað var kortini ilt at síggja nakað til tað.

Í síðstu løtu var bólturin á veg í NSÍ málið, eftir roynd frá Slavisa Kaplanovic, men Óli Hansen sópaði burtur bara ein hálvan metur frá mállinjuni.

NSÍ var vandamikið í onkrum mótálopi. Serliga tá ið teir tvær ferðir fingu fríspark í góðum støðum uttanvert Skála brotsteigin. Men Hans Jørgensen í Skála málinum var aftur hesa ferð sera stinnur.

## Ein góð kensla

Liðskiparin hjá NSÍ, Óli Hansen, duldi ikki fyri, at hjá teimum var sigurin sunnudagin mest sum altavgerandi.

- Tað er ein góð kensla, tá vit fara av Skála við trimum stigum. Bæði heima og úti hava vit altíð sera truplar dystir móti Skála, so vit eru sera fegnir um stigini.

Sum stigatalvan var, so var eisini stórt trýst á tykkum. Kendu tit hetta undan dystinum?

- Tað kanst tú gott siga. Taptu vit, so vildu vit mist sambandið við oddin, eins og Skála tá veruliga hevði fingið tak á okkum. Hinvegin merkir sigurin, at vit framhaldandi hava samband við oddin. Og so er tað til at liva við, at spælið eftir steðgin ikki var nóg gott. Tá loyva vit Skála ov langt niðan á vøllin at spæla, og tað kundi væl havt kostað okkum sigurin, heldur Óli.

Spurdur, hvørt NSÍ nú veruliga leggur seg eftir oddinum, vil Óli tó ikki staðfesta nakað sum helst.

- Beint nú er næsti dysturin – móti B71 – tann týdningarmesti. Fleiri halda kanska, at tað eigur at vera ein dystur, har vit vinna trý stig. Men eg haldi kortini, at sandoyingarnir hava ávarað so ofta, at tað er neyvan eitt gott hugskot at undirmeta teir.

## Málini vanta

Fyri fyrstu ferð í seks umfør noyddist Skála av vøllinum uttan stig. Og sum vera man, so hóvaði hetta ikki spælarunum nakað serligt.

- Sjálvandi ikki. Vit hava havt góð úrslit nú í fleiri umfør, og so er tað einki stuttligt at tapa við einum máli. Serstakliga, tá talan er um dyst móti grannunum, sigur Arnhold Berg.

Og hann fær ikki annað enn iðra seg um, at Skála ikki gagnnýtti seinna hálvleik betri.

- Vit sótu á øllum eftir steðgin. Tað einasta, sum restaði, var at vit skoraðu, men tað megnaðu vit so ikki hesaferð. So har hava vit í øllum førum nakað at arbeiða við.

Men hóast tapið, so ivast Arnhold ikki í, at liðið fer at reisa seg aftur. Og hann slær fast, at sjálvsálitið í hópinum er nakað væl sterkari nú, enn tað var eftir fyrstu fýra umførini.

- Enn hava vit 17 dystir eftir. Megna vit at halda fast um góða rákið, sum hevur verið, so beri eg ongan ótta fyri, at vit ikki skulu klintra longur upp á talvuni. Í so máta er bert at koyra á, sigur Arnhold.